## Stanley í Noregi

Um vikuskiftið fer fuglfirðingurin Stanley Samuelsen at hava tvær konsertir í Noregi. Konsertirnar verða í Privaten í Holmsbo fríggjakvøldið kl. 22, Bakeren í Åros leygarkvøldið kl. 22.30 og í Slemmestad Pub sunnudagin kl. 18, og skárin umfatar hansara egnu tulkingar av kendum løgum hjá Beatles, Eagles, Neil Young og øðrum. Hetta er aðru ferð, at Stanley Samuelsen spælir í Noregi. Fyrru ferð var í september í fjør.

## Nýtt blað

Eitt nýtt blað er komið í handlarnar og kioskirnar. Talan er um mánaðarblaðið KEND, sum reklamustovan Mediagraph gevur út. Blaðstjóri er Símun úr Konoy, og Hilmar Jan Hansen og onnur skriva og taka myndir. KEND skrivar, sum navnið sigur, serliga um kend fólk so sum politikarar og tónleikarar. Blaðið líkist teimum donsku vikubløðunum, men útgevararnir siga, at innihaldið er øðrvísi. Nakin fólk og gølur fáa ikki pláss í KEND.

# Stór framgongd hjá Norðoya Sparikassa



-Tað er ein spegilsmynd av gongdini í samfelagnum, at peningastovnar mugu læna pengar uttanlands fyri at fíggja virksemið, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa.

**Stóri eftirspurningurin eftir fígging gjørdi, at fyri fyrstu ferð hevur sparikassin lænt pengar uttanlands fyri at nøkta eftirspurningin.**

FÍGGJARVIRKSEMI
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Norðoya Sparikassi hevur styrkt sína støðu á føroyska fíggjarmarknaðinum aftan á eitt gott ár í fjør. Úrslitið var væl omanfyri tær 29 mió. krónurnar, sum leiðslan væntaði, tá fíggjarætlanin bleiv løgd. Vøksturin í javnanum var eisini stórur - umleið 17 prosent.

Í seinastuni hevur Norðoya Sparikassi breitt seg til ein størri part av landinum. Í heyst læt nýggj deild upp í Runavík, og flaggdagin letur nýggj deild upp í Havn. Trý fólk arbeiða á deildini í Runavík, og hon ber seg longu, sigur stjórin, Eyðfinn Reyðberg.

Á nýggju deildini í Havn fara sjey fólk at arbeiða, og har er viðskiftagrundarlagið longu so gott, at deildin fer at geva yvirskot frá fyrsta degi.

At sparikassin hevur breitt sítt virkisøki landafrøðiliga hevur givið honum fleiri nýggj viðskiftafólk. Í fjør komu ikki færri enn 1500 nýggj nøvn í viðskiftayvirlitið, og tað svarar til ein vøkstur upp á heili 10 prosent.

### Stórur lánsvøkstur

Útlánini hjá Norðoya Sparikassa vuksu nógv í fjør og væl meiri enn innlánini. Um ársskiftið vóru innlánini umleið 1,4 mia. krónur, sum var smá 10 prosent prosent meiri enn eitt ár frammanundan. Hinvegin vóru útlánini umleið 1,5 mia. krónur ella umleið 30 prosent størri enn fyri einum ári síðani.

Eyðfinn Reyðberg sigur, at meginparturin av vøkstrinum í útlánunum stavar frá sethúsafígging. Av útlánunum eru einar 400 mió. krónur eru heimlán, sum Norðoya Sparikassi fór undir at bjóða fólki fyri einum ári síðani, og aðrar 300 mió. krónur eru gomul lán við 1. veðrætti. Sostatt eru millum 700 og 800 mió. krónur sethúsalán av samlaðu útlánunum sethúsalán, og stjórin heldur ikki, at váðin er serliga stórur.

– Meðalskuldin í heimlánunum er 850.000 krónur, og meðalskuldin í teimum gomlu lánunum við 1. veðrætti er millum 300.000 og 400.000 krónur, sigur hann.

Norðoya Sparikassi herdi í fjør krøvini í sambandi við at fíggja sethús í Havn. Eyðfinn Reyðberg sigur, at húsaprísurin í Havn fór so langt upp, at sparikassin helt tað ikki vera ráðiligt at fíggja húsini fult út. Tí bleiv krav sett um eina rímiliga eginfígging.

### Lænt uttanlands

Tann stóri eftirspurningurin eftir fígging gjørdi, at fyri fyrstu fer hevur Norðoya Sparikassi lænt pengar uttanlands til virksemið. Tað var í oktober-ársfjórðingi, og leiðslan hevur longu gjørt av at læna aftur í hesum ársfjórðingi og næsta.

Eyðfinn Reyðberg sigur, at hetta er ein spegilsmynd av gongdini í samfelagnum við halli á handilsjavnanum, nógvum og dýrum íløgum bæði innan fyri tað almenna, kommunala og tað privata og stórari privatari nýtslu.

– Føroysku peningastovnarnir hava ikki pengar til at fíggja alt hetta virksemið og noyðast tí at læna pengar uttanlands, men tað er eingin vandi í tí, sigur hann.

### Íløga kostaði

Norðoya Sparikassi var við til leggja lunnar undir flogfelagið FaroeJet, og tað kom at kosta sparikassanum fimm mió. krónur, tá flogfelagið fór í gjaldssteðg. Sparikassin átti upprunaliga 2,5 mió. krónur í partapeningi í felagnum og átók sær seinni 2,5 mió. krónur afturat.

Men missurin nervar ikki úrslitið størvegis, sigur Eyðfinn Reyðberg, tí sparikassin seldi eisini partabrøv í fjør við góðum vinningi. Umframt útlendsk partabrøv seldi sparikassin partabrøv í partafelagnum Kósini í Klaksvík í fjør, og samanlagt gav partabrævasølan eitt positivt avkast, sigur Eyðfinn Reyðberg.

